# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## 26 pedagogar útskrivaðir av Føroya Lærarskúla



**Fríggjadagin 4. februar 2005 varð ein flokkur av pedagogum útskrivaður av Føroya Lærarskúla**

*Fremra rað f.v.: Siborg Kathrina Arge, Hoyvík, Finnbogi Berg, Saltangará, Ása Sóleyg Danielsen, Tórshavn, Helena Danielsen, Toftir, Lillian Poula Djurhuus, Hoyvík, Guðrun Eysturlíð, Tórshavn, Jacquelina Gardar, Klaksvík, Alisa Hammer, Strendur, Poula Højgaard, Tórshavn, og Ingun F. Wenningsted, Tórshavn.*
*Mittasta rað f.v.: Vivi Jacobsen, Toftir, Ásla J. H. Joensen, Tórshavn, Jóhanna Joensen, Tórshavn, Marin Fríðvør Johannesen, Sandur, Rannvá Johansen, Strendur, Hugo Leo, Leirvík, Vinni Lilaa, Klaksvík, og Saula Manai, Tórshavn,*
*Aftasta rað f.v.: Jean J. P. Miné, Hoyvík, Bjørg Krossteig Olsen, Hoyvík, Rannvá Eysturberg Olsen, Argir, Jóhanna F. Petersen, Toftir, Maiken E. Petersen Hoyvík, Asta M. Poulsen, Klaksvík, Lea Wolles, Søldarfjørður, og Konny Nolsøe Zachariasen, Kirkjubøur.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Edith Reines Kambsenni 75 ár



Í gjár, mánadagin 7. februar, fylti Edith Reines Kambsenni 75 ár. Dagin helt hon á Viðareiði, har einasti sonur hennara og familjan hjá honum búgva.

Edith er úr Klaksvík og elst av átta systkjum. Foreldrini vóru Ella, sum var ættað úr Elduvík, og Jógvan Højbro, sum var ættaður úr Norðurstovu í Gerðum í Klaksvík. Tey búsettust á Heygum, og børnini hjá teimum vóru Edith, Karla, Hansy, Sanna, Hansina, Jastrid, Alexandrina og Bjarti. Alexandrina doyði fyri nøkrum árum síðani. Edith, Hansy, Hansina, Jastrid og Bjarti búgva í Klaksvík, Karla býr á Norðskála, og Sanna býr í Miðvági.

Edith hevur alla sína tíð fingist við handil og tænastuvirksemi. Sum blaðung arbeiddi hon í handlinum hjá Kal og á vaskarínum. Í 1948 fór pápin at handla. Fyrstu fýra árini var tað í kjallaranum í húsunum, sum eru á norðara horn-inum á Oyravegnum og Kráargøtu. So flutti handilin oman í bygningin, sum Jógvan Højbro hevði bygt upp í sunnara enda á sethúsunum á Heygum. Handilin fekk navnið Heygabúðin, og hann er víðkaður fleiri ferðir tey meiri enn hálvt hundrað árini, sum hann hevur verið til.

Døtrarnar hjá Ellu og Jógvani Højbro vóru í longri og styttri skiftum í handlinum, og Edith, sum hevur verið ógvuliga arbeiðssom, hevur alla tíðina verið knýtt at Heygabúðini. Tá ið pápin legði frá sær, vóru tað hon og beiggin, sum høvdu ábyrgdina av gerandisdegnum, meðan mamman arbeiddi aftanfyri kulissurnar við døgurðamati og øðrum. Nú hevur Bjarti í mong ár verið stjóri. Sonur Edith arbeiðir í Heygabúðini, og Edith og maðurin hava framvegis sín leiklut. Tað eru tey, sum syrgja fyri eitt nú rullupylsunum, kjøtpylsunum og góða fiskafarsinum.

Edith giftist í 1956 við Símun Paula Reines úr Fugla-firði. Tey fingu í 1958 Poul, men longu í 1960 druknaði Símun Pauli, tá ið hann og Edith og onnur í familjuni ein vakran summardag vóru útferð á Blankaskála.

Í 1980 giftist Edith uppaftur við Fredag Kambsenni, sum var einkjumaður, og sum er ættaður úr Fuglafirði. Tey bæði hava øll árini búð á Heygum.

Hóast hon hevur verið nógv í Heygabúðini, so hava stundir eisini verið til annað hjá Edith. Eitt nú var hon í mong ár í nevndini og kassameistari í eldrafelagnum Hugni, og so vitja hon og Fredag familjuna kring landið og eisini uttanlands.

**Dagurin**

**8. februar. Korinta,** deyð umleið ár 250. Kristin kona í Aleksandriu, sum ikki vildi ofra til heidnar gudar og tí varð tikin av døgum.

## A better life for all



*Jákup Lindenskov og Anker Jørgensen, fyrrverandi forsætisráðharri, hittust heima hjá Ankeri á Borgbjergsvej í Keypmannahavn dagin fyri, at dagsins fólkatingsval varð útskrivað. Hóast tey 82 árini hevur Anker Jørgensen eisini verið virkin í valstríðnum hesaferð*

– Plakatin í stovuni hjá Anker Jørgensen, fyrrverandi forsætisráðharra, á Borgbjergsveg 1 í Keypmannahavn hevur rætta heitið fyri rættan Javnaðarflokk.

Tað vóru teir báðir samdir um - Jákup Lindenskov og Anker Jørgensen hetta kvøldið fyri, at dagsins fólkatingsval varð útskrivað.

Teir vóru báðir í Fólkatinginum samstundis, tá týðandi mál – eisini Føroyum viðvíkjandi – vóru framd. Eisini í hesum valstríðnum hevur Anker boðað formanni sínum, Mogens Lykketoft frá, at hann er tøkur at stríðast fyri endamálinum: »A BETTER LIFE FOR ALL«.

Málningin hjá Eyvindi Mohr, ið hómast aftan fyri Jákup á myndini, er Anker sera hugtikin av. Anker er 82 ára gamal. Nøkur ár eru síðani, at hann misti sína kæru Ingrid, men hann býr framvegis í íbúð teirra í Sydhavnen.

Anker Jørgensen varð fyrstu ferð valdur í Fólkatingið í 1964. Í 1972 gjørdist hann forsætismálaráðharri, tá Jens Otto Kragh legði frá sær dagin eftir fólkaatkvøðuna um EF-limaskapin. Hann var forsætismálaráðharri frá 1972-73 og frá 1975-82.

Jákup Lindenskov varð fyrstu ferð valdur í Løgtingið í 1958. Hann var landsstýrismaður frá 1968-79. Hann var fólkatingsmaður frá 1979-84, 1987-88 og frá 1990-93. Hann gavst í politikki tá hann ikki stillaði uppaftur til løgtingsvalið í 1994.